# Arbeiða í øllum veðri

**- Vit hava altíð okkurt arbeiði at gera, siga teir báðir, Jón Magnusson og Magnus Damberg í Haraldssundi. Teir hava sítt arbeiði at gera og passa fyri Kunoyar Kommunu – og so er líkamikið hvussu veðrið er**



*Tað er eitt fitt petti at ganga frá spæliplássinum og »hoylt« norður til grótbrotið við plátunum*

BYGDARLÍV

*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Haraldssund:** - Her var so mikið nógvur vindur, at tornini á spæliplássinum fóru í knús. Og nú eru vit farnir at rudda alt uppaftur, siga teir báðir.

Við trillibøruni millum sín – annar frammanfyri og hin við handtøkini – vóru teir í ferð við at koyra óruddið frá spæliplássinum burtur.

Teir hava í nøkur ár arbeitt fyri kommununa eftir loknan skúladag, og hava teir luttikið í mongum ymiskum arbeiðum enn júst hesum.

- Ja, vit hava gjørt so nógv ymiskt hesa tíðina – reinsa áirnar, hildið veitirnar opnar og annar gjørt ymisk viðlíkahaldsarbeiði, greiðir Jón frá.

Vinmenninir báðir vóru henda dagin í ferð við eitt heilt annað arbeiði, nevniliga at rudda spæliplássið eftir ódnarveðrið herfyri.

Annars ganga Jón og Magnus í 10. flokki í skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík. Í frítíðini arbeiða teir, men spæla annars bólt, við teldur og annað slíkt.

## Ikki brúkast aftur

Herviliga ódnarveðrið gjørdi eisini um seg í Haraldssundi. Millum tey støðini sum fingu skaða var spæliplássið hjá børnunum í bygdini.

Tornini, sum børnini annars plagdu at stuttleika sær í, koppaðu og fóru so mikið illa, at tey ikki kunnu brúkast aftur.

Henda dagin í farnu viku, tá Sosialurin hitti teir báðar skúlanæmingarnir og arbeiðsmenninar, Jón og Magnus vóru teir í ferð við at beina alt tað burtur hagani, og sum ikki kundi brúkast aftur.

Sum myndin her á síðuni vísir, høvdu teir laðað nakrar plátur upp á eina trillubøru, og vóru í vátveðrinum á veg norður til grótbrotið í bygdini.

- Ja, hetta er farið so mikið illa, at tað kann ikki brúkast aftur, greiðir Jón frá.

Tað sum hóast alt kann brúkast aftur, hava teir lagt til viks, og kann – um neyðugt – brúkast umaftur til eitthvørt endamál.

## Nøkur oyru

Arbeiðsmenninir og vinirnir báðir ganga sum nevnt í skúla í Klaksvík, men forvinna sær so pening við at arbeiða fyri kommununa eftir loknan skúladag.

- Vit hava gjørt tað í nøkur ár, og tað er í fínasta lagi at fáa nøkur oyru á henda hátt, siga teir báðir við ein munn.

Teir byrjaðu fyri eini 3-4 árum síðani í hesum arbeiðinum, tá kommunan fór undir at gera ymiskt í bygdini, millum annað nýggjar brandpostar.

- Eg veit ikki. Vit spurdu teir, um vit ikki eisini kundu sleppa til arbeiðis. Og tað sluppu vit so.

- Síðani hava vit luttikið í ymiskum arbeiðum, eitt nú við at halda bygdina viðlíka, sigur Jón.

## Fittur teinur

Veðrið er ikki av tí besta henda dagin, vit hittu teir báðar ungu menninar í Haraldsundi.

Tað var bæði vindur og ælaveður, men hetta forðaði teimum kortini ikki í at gera tað arbeiðið, sum teir vórðu settir til henda dagin.

Teir vóru farnir í skúlan sum vanligt, men so týtt og knapt sum teir fingu frí klokkan hálvgum tvey, skundaðu teir sær til Haraldssunds. Her fingu teir sær ein skjótan døgurðabita og síðani beinleiðis í arbeiðsklæðini.

- Vit vóru klárir her klokkan tvey, og eg vænti bara at vit verða her til klokkan fimm í dag, sigur Jón.

Tað er eitt ávíst arbeiði at fáa hesar pláturnar á trillibøruna, men tað størra arbeiðið er at flyta alt hetta í grótbrotið, niðri við havnarlagið í bygdini.

- Tað er ein fittur teinur norður hagar, men tað bilar einki, siga teir báðir við ein munn.

> *Skal man fáa studning, so má ein altso búgva á útoyggj*